UTTAN ÚR HEIMI

# Hóttir við at bumba Iran

**Amerikanski ST-sendiharrin hóttir nú við at bumba kjarnorkuverk í Iran, sum svarar aftur við at hótta við at steðga oljuútflutninginum.**

KJARNORKUSTRÍÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Teir eiga at skilja, at allir møguleikar liggja á borðinum, og teir eiga eisini at skilja, hvat tað merkir. Vit kunnu søkja at ymsum málum, eisini kjarnorkuútbúnaðinum.

Orðini eigur amerikanski ST-sendiharrin, John Bolton, og tey fullu á einumn fundi, sum hann hevði við bretskar politikarar í síðstu viku. Sambært AP vísa tey, hvussu álvarssom støðan viðvíkjandi teimum iransku kjarnorkuverkætlanunum veruliga er, nú altjóða kjarnorkueftirlitið IAEA skal viðgera málið í vikuni.

John Bolton verður roknaður sum ein av teimum harðrendu í amerikonsku umsitingini, og hann er fyri at forða iranum í at útbyggja kjarnorkuna. Men sambært bretskum politikarum, sum hittu hann og onnur amerikonsk umboð í síðstu viku, hava uttanríkisráðið og fregnartænastan CIA hug at fara heldur hóvligari fram ímóti Iran.


*Amerikanski ST-sendiharrin, John Bolton, hóttir Iran við bumbuálopum, gevst landið ikki við sínum kjarnorkuverkætlanum*

Iran kann koma á dagsskránna hjá ST-trygdarráðnum longu í næstu viku, um IAEA velur at spæla bóltin hagar. Amerikanska blaðið Time Magazine veit at siga, at USA hevur longu fyrireikað seg til, at málið kemur í trygdarráðið, og at USA er í ferð við at útverga prógv fyri, at Iran er í ferð við at gera eina kjarnorkubumbu, sumn er átøk teimum, sum amerikanararnir tveittu niður yvir Hiroshima og Nagasaki í 1945. Prógvið sigst vera ein tekning, sum CIA skal hava funnið á einari farteldu hjá einum iranskum kjarnorkuverkfrøðingi, skrivar blaðið.

**Oljan sum vápn**

Sambært blaðnum ætla amerikanararnir, at prógvið skal fáa Russland og Kina at taka undir við revsiatgerðum ímóti Iran, men Time Magazine ávarar um, at hetta kann enda, sum tá Colin Powell á sinni royndi at sannføra heimin um øll hópoyðingarvápnini hjá Saddam Hussein. Sambært blaðnum skal CIA eisini hava ávarað um, at tænastan hevur ikki funnið nakra „rúkandi skammbyrsu“ í Iran at leggja á borðið.

Iranar hava longu svarað, at teir eru til reiðar at svara aftur, gera USA ella trygdarráðið seg inn á landið.

– Skal trygdarráðið viðgera støðu okkara, kann tað elva til trupulleikar hjá øðrum eins væl og hjá okkum, men vit vilja helst sleppa undan at brúka oljuna sum vápn, segði iranski samráðingarleiðarin, Ali Larijani, mánadagin.

## Fólkið skal døma

Tann illa kroysti forsætisráðharrin í Teilandi, Thaksin Shinawatra, tvíheldur um valdið, hóast fólk í tíggjutúsundatali ganga kravgongu hvønn einasta dag við kravi um, at hann skal leggja frá sær. Støðan er vorðin so álvarssom, at hon er tann ringasta, síðani herurin bleiv noyddur at lata valdið frá sær í 1992, skrivar AP úr Bangkok.

Shinawatra sigur, at hann fer ikki at leggja frá msær, uttan so at hann fær minni enn 50 prosent av atkvøðunum á valinum, sum verður 2. apríl. Upprunaliga skuldi valið ikki vera fyrr enn í 2009, men forsætisráðharrin valdi at framskunda tað, tá mótmælini ímóti honum byrjaðu.

Tey, sum krevja Thaksin Shinawatra frá, leggja hann undir valdsmisnýtslu og svik, og hann verður eisini skuldsettur fyri at hava brotið mannarættindini. Millum annað verður víst á, at tá hann og skyldfólk hansara sluppu undan at gjalda 1,9 milliard dollarar í skatti, tá tey herfyri seldu eina fyritøku. Tey brutu ikki lógina, men brúktu eina smogu í lógini, og tað halda mótmælisfólkini ikki vera sambæriligt við forsætisráðharrastarvið. Mong vilja eisini vera við, at Shinawatra hevur misbrúkt sítt starv til at fylla egnar lummar, og at hansara næstringar hava eisini fingið væl buurturúr tey árini, hann hevur verið forsætisráðharri.

## Hjúnarskilnaður arviligur

Norski granskarin Ingunn Størken er í einari ritgerð komin til ta niðurstøðu, at børn hjá hjúnum, sum verða skild, eru í tvær ferðir størri vanda fyri at koma í somu støðu enn børn hjá hjúnum, sum verða verandi í hjúnarlagnum. Uppaftur verri er tað, um eini hjún hava tað til felags, at foreldrini hjá báðum eru skild. Tá er tríggjar ferðir størri vandi fyri, at eisini tey fara frá hvør øðrum.

Ingunn Størken sigur, at hóast tey flestu, sum velja at giftast, gera tað av kærleika og í vónini um, at hann fer at halda, so hava royndirnar frá egnum lívi eisini týdning. Kemur ólag í hjúnarlagið, hava børn hjá skildum foreldrum lættari við at lata seg skilja, tí tey hava roynt ta fyrr, sigur hon.

Tað er tann sosiali arvurin frá foreldrunum, sum ger, at fólk hjá skildum foreldrum hava lættari við at velja hjúnarskilnað enn onnur, sigur norski granskarin í ritgerðini.

# Nýtt spor í Palme-málinum

**Løgreglan hevur fingið ein part av einari skammbyrsu, sum kann vera morðvápnið**

PALME-MÁLIÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Sum skilst er talan um múlan á einari skammbyrsu, og sambært Aftonbladet var tað tíðindamaðurin Nuri Kino, sum kom á løgreglustøðina við honum. Hann hevur í fleiri ár arbeitt sum sjálvsstøðugur tíðindamaður.

Løgreglan í Stockholm segði seinni, at múlin er av einari skammbyrsu av slagnum Magnum 357 ella sama slag skammbyrsu, sum Olof Palme bleiv skotin við fyri 20 árum síðani.

– Vit fara nú at skjóta nøkur skot við múlanum, segði Stig Esqvist, sum stendur fyri kanningunum í Palmemálinum.

Tað er ikki greitt, hvar Nuri Kino hevur fingið fatur á skammbyrsumúlanum, men summi vilja vera við, at løgreglan hevur havt hann í fleiri ár.


*Olof Palme. Er múlin av skammbyrsuni, sum hann bleiv skotin við?*

## Misnøgd við pávavitjan

Í Italia er tann politiska andstøðan misnøgd við, at Silvio Berlusconi, forsætisráðharri, skal vitja Benadikt páva 16. seinni í mánaðinum.

Andstøðan sigur tað vera óheppið, at forsætisráðharrin skal á pávavitjan bara fjúrtan dagar undan italska tjóðartingsvalinum, sum verður tann 9. apríl, tí andstøðan ivast ikki í, at Berlusconi fer at misbrúka vitjanina í valstríðnum. Tað kann fáa týdning, tí veljarakanningar vísa, at tað er sera lítil munur á stjórnarsamgonguni og andstøðuni.

Tað er kortini ikki so, at Berlusconi hevur fingið eina persónliga innbjóðing frá pávanum. Men forsætisráðharrin skal í Vatikanið í sambandi við, at fleiri evropeiskir høgrapolitikarar halda fund í Rom, og pávin hevur boðið teimum øllum innar á gólvið, skrivar AP úr Rom.

## Frp. størstur í Noregi

Tað gongur sum eftir ánni hjá norska Framburðsflokkinum, sum nú rósa sær av at vera størsti flokkur í Noregi.

Ein kanning, sum Bergens Tidende almannakunngjørdi í gjár, vísir, at var val til Stórtingið nú, hevði Framburðsflokkurin fingið 31,8 prosent av atkvøðunum. Tað eru 4,7 prosentstig meiri enn fyri bara einum mánað síðani.

Harafturímóti gongur tað illa hjá tí stóra stjórnarflokkinum. Arbeiðaraflokkurin fær sambært nýggju kanningini 28,7 prosent ímóti góðum 33 prosentum fyri einum mánað síðani. Hinir báðir flokkarnir í stjórnini standa at kalla í stað.